# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 11. september 2009



Um eina viku hittast AB og KÍ í avgjørda oddabrakinum. Undan hesum skal KÍ tó dystast við Víking, sum higar til hevur dugað væl at argað tey bæði fremstu liðini
savnsmynd

# Víkingur vitjar KÍ

**Bara trý umfør eru eftir av fótbóltskappingini hjá kvinnunum, og har er spurningurin framvegis opin, um tað verður KÍ ella AB, ið verður meistari. Mest spennandi dysturin hetta umfarið er í Klaksvík, har Víkingur vitjar KÍ**




Hilmar Jan Hansen

Tá triðsíðsta umfar í 1. deild hjá kvinnum verður spælt sunnudagin, munnu flestu verða vend ímóti dystinum í Klaksvík, har KÍ tekur ímóti Víkingi. Hóast KÍ er favorittur, er ikki lætt at vita, hvat Víkingur kann fáa burturúr.

Síðsta sunnudag tók Víkingur á heimavølli stig frá hinum oddaliðnum, AB, tá dysturin teirra millum endaði við javnleiki, men har trutu ikki møguleikarnir hjá Víkingin at fara avstað við øllum trimum stigunum.

So er spurningurin, um tær úr Gøtu og Leirvík eru líka stinnar á útivølli, umframt at KÍ sjálvandi ikki skal forsmáast, tí tað er ikki av tilvild, at liðið er oddalið – aftur í ár!

## Hinir dystirnir

AB-kvinnurnar, sum á stigatalvuni eru tvey stig aftan fyri KÍ, skulu til Margáir at spæla ímóti EB/Streymi, og har ber illa til at tosa um annað, enn at gestirnir eru stórfavorittar.

Men hóast EB/Streymur ikki hevur víst tað stóra í ár, tók tað altso sína tíð hjá KÍ at fáa hol á norðurin í Sundalagnum fyri hálvaritriðju viku síðani, so tað kann meiri enn so henda seg, at AB noyðist at arbeiða fyri sakini.

Triði dysturin hetta umfarið er ein uppgerð millum vestara og eystara arm á Skálafjørðinum, tí Skála tekur ímóti B68/NSÍ. Her man neyvan nakar vænta annað enn ein heimasigur til Skála, sum hevur potentiali til at koma uppaftur longri komandi árini.

## Ultimativa finalan

Tá hesir tríggir dystirnir eru farnir aftur um bak, eru bara tvey umfør eftir, og í longri tíð hevur verið tosað um, at tann ultimativa FM-finalan verður um tvær vikur á Argjum, tá AB og KÍ bresta saman har.

Sum nevnt, hevur KÍ tvey stig fleiri, umframt at málúrtøkan hjá klaksvíkskvinnum er heili 45 mál betri enn tann hjá AB. Men tølini spæla ongar dystir, og sum nú sær út, verður hesin dysturin á Argjum helst avgerandi fyri, hvussu tað heila endar.

**Síðstu umførini**

| | |
|---|---|
| 13/09 | KÍ-Víkingur |
| 13/09 | Skála-B68/NSÍ |
| 13/09 | EB/Streymur-AB |
| | |
| 27/09 | AB-KÍ |
| 27/09 | Víkingur-Skála |
| 27/09 | B68/NSÍ-EB/Streymur |
| | |
| 03/10 | KÍ-Skála |
| 03/10 | AB-B68/NSÍ |
| 03/10 | EB/Streymur-Víkingur |

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 22 | 14 - 6 - 2 | 51 | 28 | 23 | 48 |
| 2 | EB/S | 22 | 11 - 5 - 6 | 44 | 28 | 16 | 38 |
| 3 | B68 | 22 | 10 - 6 - 6 | 43 | 37 | 6 | 36 |
| 4 | NSÍ | 22 | 10 - 5 - 7 | 46 | 37 | 9 | 35 |
| 5 | Víkingur | 22 | 10 - 5 - 7 | 40 | 31 | 9 | 35 |
| 6 | AB | 22 | 8 - 6 - 8 | 25 | 26 | -1 | 30 |
| 7 | ÍF | 22 | 6 - 5 - 11 | 32 | 40 | -8 | 23 |
| 8 | B36 | 22 | 5 - 6 - 11 | 26 | 42 | -16 | 21 |
| 9 | 07 Vestur | 22 | 4 - 6 - 12 | 33 | 51 | -18 | 18 |
| 10 | KÍ | 22 | 4 - 6 - 12 | 25 | 45 | -20 | 18 |

**Formbarometrið**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 6 | 4 - 2 - 0 | 13 | 4 | 9 | 14 |
| 2 | EB/S | 6 | 4 - 1 - 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 3 | HB | 6 | 4 - 1 - 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 4 | 07 Vestur | 6 | 3 - 1 - 2 | 11 | 9 | 2 | 10 |
| 5 | NSÍ | 6 | 2 - 2 - 2 | 12 | 12 | 0 | 8 |
| 6 | Víkingur | 6 | 1 - 2 - 3 | 10 | 12 | -2 | 5 |
| 7 | B68 | 6 | 1 - 2 - 3 | 8 | 12 | -4 | 5 |
| 8 | ÍF | 6 | 2 - 1 - 3 | 12 | 17 | -5 | 7 |
| 9 | B36 | 6 | 1 - 1 - 4 | 6 | 11 | -5 | 4 |
| 10 | KÍ | 6 | 1 - 1 - 4 | 5 | 16 | -11 | 4 |

**1. deild**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 22 | 13 - 5 - 4 | 51 | 36 | 15 | 44 |
| 2 | B71 | 22 | 11 - 6 - 5 | 46 | 32 | 14 | 39 |
| 3 | HB | 22 | 11 - 5 - 6 | 47 | 32 | 15 | 38 |
| 4 | TB | 22 | 11 - 5 - 6 | 48 | 37 | 11 | 38 |
| 5 | B68 | 22 | 9 - 4 - 9 | 54 | 45 | 9 | 31 |
| 6 | NSÍ | 21 | 8 - 4 - 9 | 38 | 44 | -6 | 28 |
| 7 | FC Hoyvík | 22 | 9 - 1 - 12 | 30 | 41 | -11 | 28 |
| 8 | Víkingur | 21 | 7 - 6 - 8 | 34 | 31 | 3 | 27 |
| 9 | Skála | 22 | 7 - 4 - 11 | 31 | 34 | -3 | 25 |
| 10 | MB | 22 | 2 - 2 - 18 | 25 | 72 | -47 | 8 |

**1. deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 17 | 14 - 2 - 1 | 87 | 7 | 80 | 44 |
| 2 | AB | 17 | 13 - 3 - 1 | 42 | 7 | 35 | 42 |
| 3 | Víkingur | 17 | 9 - 4 - 3 | 36 | 20 | 16 | 31 |
| 4 | Skála | 17 | 6 - 1 - 4 | 21 | 43 | -22 | 19 |
| 5 | EB/Streymur | 17 | 2 - 1 - 14 | 8 | 58 | -50 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 17 | 1 - 1 - 15 | 6 | 65 | -59 | 4 |